# Leiðslurnar ikki við í politikkinum

*Sambandstingmaðurin eftirlýsir, at leiðslurnar í Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum taka stig til at finna felags breiða semji í staðin fyri bert at tosa*

JOHN JOHANNESSEN

– Tosað og skrivað verður millum sambandsflólk um, at ljós sæst fyri einari breiðari semju við Javnaðarflokkin í sjálvstýrismálinum. Men trupulleikin við hesum er, at talan bert er um tos.

Heðin Morytensen, ið er valdur inn á ting fyri Sambandsflokkin í Suðursteymoy, heldur lítið um keglið, sum í seinastuni hevur tikið segg upp í Sambandsflokkinum, um í hvønn mun flokkurin skal vera við til at seta dagsskránna í málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

– Vit hava fingið staðfest, at fólk bæði úr Sambandsflokkinum og úr Javnaðarflokkinum síggja møguleika fyri semju millum hesar flokkar og Fólkaflokkin í málinum um ríkisrættarligu støðuna. Men kortini taka leiðslurnar í flokkunum eingi stig til at tosa saman um hesi tingini.

Heðin Mortensen vísir á, at tað ikki bert nyttar at síggja innsiglingarljósið til breiðu semjuna. Sambandsflokkurin má eisini sigla við inn í samráðingarhavnina, heldur hann.

– Vit hava í uppskoti okkara, »Nýggjar Tíðir«, fínan farm, og mugu vit syrgja fyri at skipa hendan farmin upp á bryggjuna, har farmurin hjá Javnaðarflokkinum eisini er. Har kunnu vit síðani samráðast um, hvør skal keypa hvat frá hvørjum, sigur Heðin Mortensen.

Spurningurin er so, hví hevur Heðin Mortensen ikki gjørt nakað við hetta, til dømis við at taka stig til samráðingar.

– Tað kann eg væl, men tað er ikki mín uppgáva at virka sum leiðsla fyri flokkin. Eg havi gjørt vart við mína ónøgd á rætta stað, og kann eg nú ikki gera meir.

Heðin Mortensen heitir á floksfelagar sínar um at gevast við at kjakast um fullveldismálið í bløðunum, men heldur halda innanhýsis fund um málið. Annars, heldur hann, fer málið út at flóta, og tá verður keglið til fyrimuns fyri landsstýrið.

– Sum nú er, bíði eg bert eftir fundarboðum, sigur Heðin Mortensen.



*Heðin Mortensen heldur, at leiðslurnar í ávíkavist Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum mugu taka stig til samráðingar, skal breið semja finnast millum flokkarnar báðar*

# Uppritið helst almannakunngjørt týsdagin

*Á fundinum hjá Uttanlandsnevndini týsdagin verður endaliga avgjørt, um uppritið til samráðingarnar við donsku stjórnina verður almannakunngjørt*

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður og Høgni Hoydal eru báðir samdir um, at uppritið til samráðingarnar við donsku stjórnina kann almannakunngerast nær tað skal vera. Men teir vísa á, at uttanlandsnevndin eigur endaligu avgerina.

Hergeir Nielsen, formaður í uttanlandsnevndini, at hann fer onga avgerð at taka, uttan at ráðføra seg við uttanlandsnevndina. Hon hevur fund týsmorgunin, og er tá semja um at lata almenninginum uppritið, sum á brævbjálvanum, á permuni og á øllum teimum 29 síðunum er stemplað í trúnaði, ger Hergeir Nielsen hetta fegin.

### Latið tinglimum

Á seinasta fundinum í uttanlandsnevndini, ið var mikudagin, var gjørt av, at uppritið skal latast øllum tinglimum - men skuldi tað sjálvsagt latast í trúnaði.

Hetta kemur væl við hjá tingfólki, sum síðani uppritið varð latið uttanlandsnevndini hava funnist at, at lagna Føroya verður hildin loynilig fyri teimum.

Sum skilst verður uppritið í løtuni margfaldað, og kunnu politikarar vænta sær at fáa tað handað hvørja løtu.

### Kann vera til skaða

Hergeir Nielsen sigur so mikið nógv longu vera likið út um innihaldið í uppritinum, at tað kann vera til skaða, verður tað ikki almannakunngjørt. Vandi er nevniliga fyri, at vit bert fáa at vita negativar gitingar úr uppritinum, verður tað framhaldandi hildið loyniligt.

Hinvegin sær hann eisini ein vanda í, at uppritið verður almannakunngjørt. Tí tá er vandi fyri, at politiska kjakið um málið fer at fara fram uttan um uttanlandsnevndina, og er hetta, sambært honum, ikki gott fyri viðgerðina.

Løgmaður er samdur við fyrra sjónarmiðnum hjá formanni uttanlandsnevndarinnar. Hann heldur tað vera skilagott at lata uppritið út til almenningin, tá fjølmiðlarnir kortini longu hava fingið hendur á tað. Verður hetta ikki gjørt, sær hann vanda fyri, at tað í staðin bert fara at koma negativar gitingar út um ritið

Anfinn Kallsberg sigur orsøkina til, at ritið varð handað uttanlandsnevndini í trúnaði vera, at landsstýrið ynskti at halda seg til vanligar mannagongdir viðvíkjandi slíkum málum.

– Vit hava einki ímóti, at uppritið verður viðgjørt opið, sigur løgmaður.


## Starvsfólk til Føroya Tele

### Tænastumenning

**Starvsfólk til tænastumenning innan kjarnuvinnu**

Fjarskiftismarknaðurin í Føroyum mennist, og Føroya Tele hevur víst áræði og liggur á odda í hesi menningini. Uppgávan hjá Marknaðardeildini er at menna grundtænasturnar. Alla tíðina leggjast nýggjar áhugaverdar tænastur afturat innan øll virkisøki. Árið 2000 verður ikki minni annarleiðis enn árini undan, og til at menna nýggju tænasturnar tørvar okkum eitt nýtt starvsfólk, sum megnar at liva upp til framtíðar kunningarsamfelagið.

Starvsøkið er kjarnuøkið hjá Føroya Tele, sum umfatar vanliga fastnet telefoni, ISDN, fartelefonskipanirnar, boðtænastuna og eyka tænastur. Í framtíðini koma nógvar nýggjar tænastur, og størri ferð verður á nógvum av verandi tænastum.

Uppgávurnar hjá nýggja starvsfólkinum eru m.a. at:

- læra tænasturnar at kenna
- gera framskrivingar og málsetningar fyri framtíðar sølu
- gera upplegg til, hvussu tænastan skal setast saman
- gera mannagongdir, vegleiðingar og treytir
- kunna innanhýsis
- vera stuðul hjá teimum, ið hava samskifti við viðskiftafólkini
- fylgja søluni upp
- áhaldandi leita eftir møguleikum fyri at menna tænasturnar

Hetta eru spennandi uppgávur hjá tí rætta starvsfólkinum. Arbeiðið er sjálvstøðugt, hóast í tøttum samstarvi við nógv onnur á Føroya Tele. Vit hava hugsað okkum, at rætta starvsfólkið t.d.:

- hevur hóskandi marknaðarútbúgving
- hevur royndir innan sølu, marknaðarføring ella tænastumenning
- dugir væl at skriva føroyskt
- hevur skil og hegni til tøl
- dugir at finna kreativar loysnir
- dugir at arbeiða sjávstøðugt og saman við øðrum
- dugir væl at seta seg inn í nýggja tøkni og læra frá sær

Heldur tú, at tú kanst hjálpa Føroya Tele við hesum, ert tú vælkomin at søkja, eisini sjálvt um orsøkin er ein onnur enn tær omanfyri nevndu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvsbyrjan er skjótast gjørligt. Starvsstaðurin er sum grundstøði Tórshavn, men møguleiki er fyri, at starvsfólk kunnu starvast aðrastaðni. Meira fæst at vita frá Poul Henrik Poulsen ella Jónhild Rasmussen á tlf. 303030.

Umsóknir skulu vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mikudagin 16. februar 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 27
FO 110 Tórshavn

FØROYATELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*








## Framsýning hjá Reyni Service leygardagin 5. feb. kl.9.00

**Ársins og aldarinnar fyrsta bilframsýning hjá Toyota í Føroyum og Reyni Service hevur ein hóp at vísa fram. M.a. vera teir spildurnýggju Toyota Corolla sýndir fram. Snøgga sniðið er hegnisligi innpakningurin til allar teir framúrskarandi eginleikarnar, hesin bilurin hevur.**

**Umframt at hava verið ársins bilur og mest seldi bilur í fleiri ár, hevur Corolla altíð borið orð á sær fyri at vera ein tryggur og álítandi bilur. Bæði til tann unga óroynda bilføraran, sum vil síggja út av nøkrum og eisini sum familjubilur, har trygd og komfort verður sett í hásæti.**

TOYOTA

REYNI SERVICE

Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tlf. 313040

**Í sambandi við framsýningina hevur Fragd & Fimi kapping kl. 15 - 17**